# Heiðrikur flytir mørk

**Ungi havnamaðurin, Heiðrikur á Heygum, gav sína fyrstu fløgu, »An Invisible Gun« fyri góðum tveimum vikum síðani. Fyri fýra vikum síðani gav hann stakfløguna »Jealous« út sum ein forsmakkur til fløguna**

ÚTGÁVA
*Annika Hedgaard Isfeldt*
*annika@sosialurin.fo*



*Fløgan hjá Heiðrikki á Heygum um ósjónliga revolvaran flytir mørk*
*Savnsmynd*

Talan er um eitt frískligt og nýskapandi lot innan føroyska tónleikaheimin, har Heiðrikkur á Heygum hevur fingið teir best royndu elektronisku tónleikararnar í landinum at hjálpa sær. Fløgan »An Invisible Gun« er freimleidd av elektro-duo'ini »High Hat« (Sakaris Joensen og Janus Rasmussen), Brynjolfi á Heygum og Heiðrikki sjálvum. Størsti parturin av fløguni er framleiddur av High Hat og Heiðrikki.

Janus Rasmussen varð kendur her á landi sum forsangarin í bólkinum Lama Sea og í løtuni er hann ein av forsangarunum í íslendska bólkinum Bloodgroup. Sakaris Joensen spældi eisini í bólkinum Lama Sea og hann hevur m.a. eisini júst framleitt vælumtóktu fløguna hjá Guðrið Hansdóttir „Love is Dead" saman við Líggjasi Olsen.

Eisini hevur Brynjolfur á Heygum sum nevnt gjørt sítt íkast til fløguna við at framleiða tvey løg saman við Heiðrik. Brynjolfur er ivaleyst best kendur fyri tónleik sín í bólkinum Side Effect og nú roynir hann seg á egnum beinum undir heitinum B.A.B.Y.

Heiðrik hevur leingi verið virkin innan aðrar listaligar greinar sum t.d. málningaog videolist umframt tónleikin. Tó er hetta fyrstu ferð, Heiðrik letur út egið tónleikatilfar.

Tónleikurin hjá Heiðrikki er fjøltáttaður, dansivinarligur og nýhugsandi. Fløgan fevnir breitt frá synth poppi til sveimandi kórútsetingar og dukandi elektro rútmir. Íblasturin er frá 80'ara surrealismuni og 90'ara popdansi-stílinum. Hann hevur sjálvur skrivað alt tilfarið á fløguni, sum er merkt av hugleiðingum um Føroyar og eini fánýtiskenslu yvir avbyrgingina í Føroyum. Tónleikurin er samstundis filmiskur og sera myndaligur.

Fløgan er miksað í gitna vintage studionum „Music A Matic" í Gøtuborg í Svøríki av kenda svianum Christoffer Berg, sum m.a. annað eisini hevur arbeitt við stórum stjørnum sum Robyn og The Knife.

Í útvarpshøllini 15. desember framførdi Heiðrikur á Heygum løg av fløguni við einum akustiskum setti. Sama kvøldið vóru Guðrið Hansdóttir og The Ghost eisini at hoyra.

At enda má sigast, at Heiðrik av álvara skýtur okkum inn í tað nýggja árið við nøkrum heilt nýggjum og nýhugsandi tónleikatilfari, sum flytir føroysk tónleikamørk.

